# Vágatunnilin stongdur í eitt korter



**Hóskvøldið varð Vágatunnilin stongdur í eitt korter, tí ein ávaringarskipan gjørdi vart við, at okkurt var galið. Tað vísti seg tó, at einki var áfatt, og tunnilin varð latin uppaftur**

VÁGATUNNIL

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóskvøldið stóð ein lang røð av bilum og bíðaði eftir at sleppa ígjøgnum Vágatunnilin.

Bummurin var farin niðurfyri, og bilarnar máttu bíða í eitt korter fyri at sleppa um Vestmannasund.

– Vit gjørdu reint í Vágatunlinum hósdagin. Tað varð vaskað og ruddað, og á onkran hátt hevur hetta ávirkað ein følara í tunlinum, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunlinum.

Ein følari boðaði Alarmsentralinum frá, at okkurt var galið, og Alarmsentralurin ringdi eftir fólki fyri at kanna hetta. Tað vísti seg tó, at einki var galið, og tá ið tað var staðfest, var tunnilin latin uppaftur fyri ferðsluni.


P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Munters
THE HUMIDITY EXPERT

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.



Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo






Hotel Føroyar søkir eftir hotelkokki til Glasstovuna at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til høvuðskokkin. Starvið umfatar ma.:

- Matgerð til kvøldmatskránna í Glasstovuni
- Matgerð til veitslur og ráðstevnur
- Menning av úrvali og góðskustøði
- Aðrar viðkomandi uppgávur

**Umsøkjarin**
- Er ábyrgdarfullur og reinførur
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur útbúgving og royndir við matgerð á hægri støði
- Kann arbeiða undir sera stórum tíðartrýsti
- Arbeiðir skjótt og væl

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og mennandi starv
- Avbjóðingar á altjóða støði
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til høvuðskokkin Gunndur Fossdal á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 28. februar 2005

GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Harumframt rekur P/F Hotel Føroyar eisini Vallaraheimið Tórshavn, sum hevur 98 seingjarpláss. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870





## Goymslulærlingur til KJ

Til goymslu okkara á Kambsdali søkja vit eftir einum goymslulærlingi.

Lærutíðin er 3 ár, um tú hevur FHS, og 2 ár um tú hevur HH.

Ert tú ágrýtin, hevur áræði og hug til at útbúgva teg á einum dynamiskum virki, so ert tú møguliga tann, ið vit leita eftir.

Ert tú áhugað/áhugaður, send skrivliga umsókn, saman við evt. prógvi, innan 26. februar 2005.

Eru spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Viggo Johannesen, søluleiðara, fart. 588828, ella Ólav Asafsson Olsen, stjóra, fart. 588817.

Umsóknir viðgjørdar í trúnaði.

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

Postsmoga 110 · 530 Kambsdalur
Tel +298 444 170 · Faks +298 444 265
info@kj.fo · www.kj.fo

KJ er ein fyritøka við serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiski- og alivinnnuídnað á sjógvi og landi, umframt til flutnings- og byggivinnuna. Sum ein av størru fyritøkunum á maskintekniska økinum í Føroyum, veitir KJ eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og Norra. Í løtuni starvast 56 fólk í fyritøkuni.